## Jákup um tey 50

Longu fyrsta altjóða landsdystin hjá Føroyum var Jákup Mikkelsen ein av spælarunum í hópinum. Tey nógvu fyrstu árini var hann tó eykamaður fyri Jens Martin, men mikukvøldið fór málverjin um teir hálvthundrað landsdystirnar. Og tað fekk hann sjálvandi blómur fyri undan dystinum.



## FØROYAR-SKOTLAND

| | | | |
|---|---|---|---|
| 12.10.94: | Glasgow: | EM | Skotland-Føroyar 5-1 (3-0): Jan Allan Müller |
| 07.06.95: | Toftir | EM | Føroyar-Skotland 0-2 (0-2) |
| 14.10.98: | Aberdeen | EM | Skotland-Føroyar 2-1 (2-0): John Petersen br |
| 05.06.99: | Toftir | EM | Føroyar-Skotland 1-1 (0-1): Hans Fróði Hansen |
| 06.09.02: | Toftir | HM | Føroyar-Skotland 2-2 (2-0): John Petersen (2) |
| 06.09.03: | Glasgow | HM | Skotland-Føroyar 3-1 (2-1): Julian Johnsson |
| 02.09.06: | Glasgow | EM | Skotland-Føroyar 6-0 (5-0) |
| 06.06.07: | Toftir | EM | Føroyar-Skotland 0-2 (0-2) |

# tu spælið




*, men inn í skotska málið vildi bólturin ikki*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

fyri at smekka til roynda at spæla Christian Lamhauge, sum varð takladur í skotroyndini.

Christian Lamhauge var óheppin, tá ið hann við høvdinum snittaði frísparksframlegging frá Súna Olsen í innaru síðuna á stólpanum, áðrenn framúr skotski málverjin, Craig Gordon, sum ivaleyst skjótt verður at síggja millum stólparnar í onkrum eingilskum stórfelag, grulvaði eftir bóltinum.

Jákup á Borg misnýtti einsamallur við málverjanum, eftir at Rógvi Jacobsen hevði spælt hann leysan, og tað vóru eisini aðrir stórir møguleikar.

Tá ið innskifti Andrew av Fløtum sneiddi seg leysan og í næstsíðsta minutti lyfti upp um málverjan og í tvørtræið, var tað staðfesting av, at hetta var ikki dagurin hjá føroyska liðnum.

Framúr avrikið eftir steðgin bar ikki úrtøku við sær, og tað var so sera harmuligt. Skotska verjan var illa sperd, og um tað hevði havt eydnast at skora eina ferð, so lá tað í lýggju summarluftini, at tað skjótt kundi havt endað 2-2, sum tað gjørdi fyri fimm árum síðani, tá ið skotar vitjaðu. Ella við føroyskum sigri.

Skotsku yrkisspælararnir fingu fullan valuta fyri sítt umfar. Føroysku amatørarnir, sum í 2. hálvleiki avgjørt stóðu mótstøðumonnunum kurl, fingu onga úrtøku. Tí var úrslitið ikki kappingarført. Tað er tað, sum telur.

Skotarnir eru farnir í summarfrí við vónini um, at teir, tá ið EM endaspælið fer av bakkastokki í dag um eitt ár, vera við í Sveis og Eysturríki.

Føroyingar fegnast um summarveðrið og í 2. hálvleiki avrik, sum enn eina ferð fær okkum at rokna við, at næstu ferð verður tað!

## FAKTA

**Føroyar-Skotland 0-2 (0-2)**

*EM undankappingardystur á Svangaskarði mikudagin 6. juni 2007 kl. 17.15.*

**0-1:** Shaun Maloney 28.

**0-2:** Garry O`Connor 35.

**Dómarakvartett úr Grikkalandi:** Georgios Kasnaferis, Cristos Gennaios, Dimitrios Papadopoulos og Mechalis Germanakos

4.176 áskoðarar

**Føroyar:** 1. Jákup Mikkelsen, B36, 50/-111 – 5. Jón Rói Jacobsen, AaB, 27/0, 13. Óli Johannesen, TB, 82/1, (3. Marni Djurhuus, EB/Streymur, 6/0, 36./ 15. Símun Samuelsen, Keflavík, 11/1, 77.), 7. Fróði Benjaminsen, B36, 43/2, 4. Atli Danielsen, BK Frem, 21/0 – 9. Jákup á Borg, HB, 51/2. (11. Andrew av Fløtum, Fremad Amager, 23/1, 82.), 8. Mikkjal Thomassen, B36, 6/0, 19. Súni Olsen, AaB, 28/1, 10. Christian Høgni Jacobsen, HB, 35/2 – 6. Rógvi Jacobsen, HB, 44/8, 14. Christian Lamhauge Holst, Lyngby BK, 6/0

**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 16. Meinhardt Joensen, KÍ, 0/0, 2. Pauli G. Hansen, Skála, 5/0, 12. Hjalgrím Elttør, NSÍ, 13/0, 15. Mortan úr Hørg, HB, 5/0, 18. Rasmus Nolsøe, HB, 1/0

**Gult kort:** Óli Johannesen 30.

**Venjari:** Jógvan Martin Olsen

**Hjálparvenjari:** John Petersen

**Málmansvenjari:** Jens Martin Knudsen

**Fysiskur venjari:** Magni Mohr

**Liðleiðarar:** Birgir Hansen og Sigurð Hansen

**Lækni:** Jens Pauli Marstein

**Fysioterapeutar:** Øssur Steinhólm og Klæmint Isaksen

**Skotland:** 1. Craig Gordon, Heart of Midlothian, 23/0 – 2. Graham Alexander, Preston North End, 30/0, 5. David Weir, Glasgow Rangers, 56/1, 4. Stephen McManus, Celtic, 5/0, 3. Gary Maysmith, Everton, 36/1 – 8. Paul Hartley, Celtic, 15/1, 7. Darren Fletcher, Manchester United, 29/4 (17. Gary Teale, Derby County, 7/0, 68.), 6. Barry Ferguson, liðformaður, Glasgow Rangers, 39/2, 11. Shaun Maloney, Aston Villa, 6/1 (13. Charlie Adam, Glasgow Rangers, 2/0, 77.) – 10. Garry O`Conner, Lokomotiv Moskva, 12/5, 9. Kris Boyd, Glasgow Rangers, 9/5 (14. Steven Naismith, Kilmarnock, 1/0, 83.)

**Á beinkinum uttan at verða skiftir inn:** 12. Allan McGregor, Glasgow Rangers, 1/0, 15. Alan Hutton, Glasgow Rangers, 1/0, 16. Gary Caldwell, Celtic, 24/2, 18. Christian Dailly, West Ham United, 65/6

**Gult kort:** Gary Maysmith 28., Barry Ferguson 74.

**Venjari:** Alexander McLeish